effo deildin FÓTBÓLTUR

ÍTRÓTTUR

AB DUMPAR IKKI AFTUR

AB	3 (1)
B36	2 (2)

0-1: Lukasz Cieslewicz 11.
0-2: Jákup á Borg 15.
1-2: Dion B. Splidt 45.
2-2: Karstin Højgaard 74.
2-3: Dion B. Splidt 90.+2.
Dómari: Lars Múller

Sigursrøðin hjá AB helt fram í gjár, tá ið gamla felagið hjá argjamonnum varð sent heim um aftur ánna við 3-2 tapi og stórum vónbroti, eftir at 2-0 leiðsla varð søplað burtur

Jóannes Hansen

Vit flyta ikki niður. Soleiðis tók AB venjarin, Sámal Eril Hentze, upp í saman vikuskifti eftir vikuskifti í vár, tá ið AB aftur og aftur fór av vøllinum uttan at hava megnað at vinna nakað stig. Seks tey fyrstu umførini vóru argjamenn krøktir.

Ikki fyrrenn í 7. umfari, sum var í Gundadali ímóti B36 flaggdagin, eydnaðist tað at vinna fyrsta stigið. Ta ferðina var úrslitið 1-1. Útjavnandi málið hjá AB eitt korter undan leikloki skoraði Dion B. Splidt. Í dramatisku grannauppgerðini í Vika í gjár, tá ið tað endaði við 3-2 heimasigri, átti Dion sín leiklut, sum vit venda aftur til um eina skamma stund.

Miðskeiðis í 1. hálvleiki bendi einki á, at talan skuldi verða um spennandi uppgerð, hóast tað úti á vøllinum gekk javnt á. B36 veteranarnir Lukasz Cieslewicz og Jákup á Borg løgdu B36 framum 2-0, og tað vóru argjafólk ikki so fegin um, sum tey í søguligum høpi plagdu at vera, tá ið B36 skoraði. Árstalsfelagið var liðið hjá teimum flestu uttanfyri ánna, har tað kendist vera langt til lokala umboðan í fremstu røð.

Soleiðis er tað ikki longur. AB hevur strítt seg upp í bestu deildina, og nú gella orðini hjá Sámal Eriki Hentze við tyngd. Hóast AB framvegis er undir strikuni, so sigur gongdin nógvu tey seinastu umførini, at AB ikki fer at flyta niður, og at tað verður okkurt av hinum feløgunum, sum fer at flyta niður, um tað yvirhøvur verður neyðugt at finna ein ella tveir dumpikandidatar.

Rættur hugburður og trúgv upp á, at tað skal bera til boygdu B36, sum mundi kenna seg tvær ferðir missa á stokkinum. Dygst undan steðginum minkaði væl upplagdi miðvallarin Dion B. Splidt um munin, tá ið hann eftir innlegg úr vinstru heilfluktaði bóltin í málið.

Men hóast AB royndi, so gekk tað í 2. hálvleiki trekt at koma aftur í aftur. Heilivágurin fyri at fáa tað at eydnast var enn eina ferð at seta Karstin Højgaard inn í álopið. Hann varð skiftur inn í 68. minutti, og seks minuttir seinni javnaði hann eftir innlegg úr vinstru frá Bjarti Kjærbo.

Sjey minuttir undan leikloki varð Sorin Anghel vístur av vølli, tá ið hann hevði sæð gult fyri aðru ferð, og so tevjaði B36 aftur fulla úrtøku. Álopsbogin varð spentur, men tað slerdi orduliga bakk, og tað var øgiliga dramatiskt.

B36 málverjin Tórður Thomsen kendi seg noyddan uttanvert brotsteigarmarkið at steðga Karstini Højgaard. Tað sá málverjin reytt fyri. Tí noyddist innskifti Súni Olsen í málverjubúnan. Men hann megnaði einki at gera við frísparki hjá Dioni B. Splidt, sum harvið skoraði sigursmálið og við triðja málinum í ár ímóti B36 syrgdi fyri, at AB higartil hevur vunnið fýra stig ímóti grannunum.

Fótbóltsliga er alt á gosi á Argjum. Eftir sigrar á Víkingi, TB, NSÍ og B36 og javnleik í Klaksvík standa meistararnir í EB/Streymi nú fyri tørnið. Tann dysturin verður á Argjum leygardagin 27. juli, og tað kann fara at vísa seg at verða vorðið sum fótbóltsligt ólavsøkupreludium hjá AB, sum við 13 stigum í fimm teimum seinastu umførunum við stórum stigum tekur seg inn á Víking og TB, og tey longri uppi á talvuni skulu heldur ikki kenna seg so trygg.

Í B36 var vónbrotið stórt. Hetta var enn eina ferð staðfesting av, at tað er torført hjá árstalsfelagnum at vinna á útivølli. Einastu sigrarnir higartil í ár aðra staðni enn í Gundadali hava verið í Sørvági og í Klaksvík. Ólavsøkuaftan verður aftur stór avbjóðing á skránni, tá ið væl uppløgdu fuglfirðingarnir koma í Gundadal.

joannes@sosialurin.fo

Effodeildin støðan

NR.	LIÐ	DYSTIR	VUNNI	JAVNT	TAPT	+ MÁL	- MÁL	+/-	STIG
1	HB	16	11	4	1	39	14	+25	37
2	ÍF	16	8	6	2	34	26	+8	30
3	EB/Streymur	15	7	4	4	30	18	+12	25
4	B36	16	4	9	3	25	19	+6	21
5	NSÍ	15	5	5	5	21	23	-2	20
6	KÍ	16	4	7	5	30	30	0	19
7	TB	16	3	7	6	16	24	-8	16
8	Víkingur	15	4	4	7	17	27	-10	16
9	AB	16	4	3	9	20	34	-14	15
10	07 Vestur	15	1	5	9	14	31	-17	8

ÁLOP ER BESTA VERJAN

ÍF	4 (1)
TB	3 (0)

1-0: Øssur Dalbúð 30.
2-0: Ari Ó. Ellingsgaardv46.
2-1: Ndende Asama Guéye 60.
2-2: Ragnar Tausen 62.
3-2: Clayton Soares 81.
4-2: Clayton Soares 88.
4-3: Óli Johannesen 89.
Dómari: Petur Reinert

Dánjal á Lakjuni, sum fyri stuttum er komin aftur úr Íslandi, gjørdi orduliga hol í sjógvin í høgra borði, eftir at ÍF í eina løtu hevði ridlað í verjupartinum, og tað var við at koppa TB til fyrimunar

Jóannes Hansen

Veðrið var framúr. Sólin skein oman og niðan, og hvítklæddu áskoðararnir fingu fult fyri atgongugjaldið – ikki minst í 2. hálvleiki. ÍF og TB vóru í sera undirhaldandi uppgerð, har tað vórðu skorað sjey mál – seks eftir steðgin – og har pulsurin var høgur, inntil Petur Reinert hevði bríkslað fyri síðstu ferð.

ÍF vann 4-3, eftir at hálvleiksstøðan var 1-0, og eftir at heimaliðið beinanvegin eftir hvíldina økti um leiðsluna. Í fyrra førinum var tað Øssur Dalbúð, sum var eirindarleysur, tá ið rangstøðufellan kiksaði hjá annars royndu TB miðverjuni, og í seinna førinum var tað miðvallarin Ari Ó. Ellingsgaard, sum í ár rættuliga hevur fingið høvdið fyri seg, ið setti bóltin í málið aftanfyri Ivan Stojkovic.

Hetta var vorðin sum pøs av vatni hjá TB at fáa í andlitið beinanvegin eftir hvíldina. Men í staðin fyri at geva skarvin yvir og royna at avmarka tapið, so løgdu tvøramenn hondina á knæið og fóru í holtur við at bjóða mótbrekkuni av.

Miðvallarin Ndende, sum tykist trívast serliga væl, tá ið veðrið er so gott, sum tað var í Fuglafirði í gjár, minkaði um munin, tá ið ein tími var farin, og bara tveir minuttir seinni var javnt. Ragnar Tausen, sum longu eftir eitt korter varð skiftur inn í staðin fyri skadda Chris H. Craib, var meistari fyri útjavnandi málinum.

So var spenningur, og tað var ikki frítt, at Poul Ingason og hinir í framrættaða partinum hjá TB høvdu fatur á rætta endanum og aðrar ferðir vóru um at spæla seg í vandamiklar støður.

Tað komst eisini av, at heimaliðið ikki var serliga sannførandi í verjupartinum. Bartal Eliasen var ikki tøkur, og undir upphitingini noyddist Poul N. Mikkelsen at geva avboð orsaka av skaða. Heri Nesá og Høgni Zachariasen vóru í miðverjuni frá fyrsta bríksli, og tað megnaðu teir væl. Men tíggju minuttir eftir steðgin noyddist Høgni Zachariasen skaddur av vøllinum, og tað darvaði verjuspælinum hjá ÍF heilt nógv, eisini tí útskiftingin bar rokeringar á miðvøllinum við sær.

Lítla løtu seinni var 2-2, og ÍF var um ein háls. Men so var tað, at vápnið, sum oftast verður sagt at vera tað besta til verju, varð nýtt. Dánjal á Lakjuni, sum fyri fáum vikum síðani flutti aftur úr íslendskum fótbólti og til barndómsfelagið, varð settur inn í framrættaða partin í høgru. Nenad Saric hevði staðið seg væl, men tá ið Dánjal var komin á vøllin, kom av álvara ferð, tyngd og broddur í, tí Dánjal megnaði at bjóða av ein ímóti einum, og innleggini hjá honum vóru so serlliga neyv.

Dánjal var meistari aftanfyri bæði málini, sum Clayton Soares skoraði síðstu tíggju minuttirnar, og hann átti eisini innleggið, tá ið Øssur Dalbúð við høvdinum sendi bóltin dygst framvið nærra stólpanum.

Síðstu løtuna spenti TB álopsbogan. Óli Johannesen varð fluttur fram í álopið, og við rimmar fluktara minkaði hann um munin. Tí var spenningur í, inntil síðsta bríkslið ljóðaði.

Heimamenninir fegnaðust, og ÍF venjarin, Albert Ellefsen, kundi staðfesta, at hann í Dánjali á Lakjuni hevur fingið eitt álopsvápn aftrat. Í fjør átti Dánjal á Lakjuni næstsíðsta fótin á, tá ið Clayton Soares skoraði fleiri mál. Í gjár sást, at samstarvið millum Lakjumannin og Clayton framvegis kann bera mál og stig og harvið møguleika fyri heiðursmerkjum við sær. Tað er neyvan nakar ivi í, at Dánjal á Lakjuni verður millum teir fyrstu ellivu, tá ið ÍF ólavsøkuaftan fer í Gundadal at spæla ímóti B36.

Ólavsøkudag skal TB enn eina ferð norður í Eysturoy at spæla. Klokkan 15 henda dagin verður fyrsta bríkslið í Sarpugerði, tá ið Víkingur fær vitjan av TB. Hesi bæði liðini stríðast fyri at sleppa av triði aftasta plássinum.